## Tjóðpallurin dygga politiska undirtøku

**Eitt nærum einmælt løgting tekur undir við, at føroyingar fáa ein tjóðpall til yrkisleiklist. Enn verður kortini bíða við at byggja eitt tjóðleikhús í høvuðsstaðnum**

LEIKLIST
*Ingi Rasmussen*

Løgtingið stuðlar Tjóðpalli Føroya at heilum hjarta.

Bara Jenis av Rana úr Miðflokkinum og Gerhard Lognberg úr Javnaðarflokkinum taka ikki undir við, at føroyingar fáa ein tjóðpall, sum skal tryggja føroyingum leiklist á høgum støði. Jenis av Rana atkvøddi ímóti og Gerhard Lognberg atkvøddi blankt, tá uppskotið um Tjóðpall Føroya var til aðru viðgerð í løgtinginum í síðstu viku. Uppskotið kemur til triðju og endaliga viðgerð í dag.

Í Tjóðpalli Føroya skulu yrkissjónleikarar arbeiða í føstum starvi. Sambært uppskotinum skal Tjóðpallur Føroya í virksemi sínum leggja dent á føroysk verk á dygdargóðum listaligum støði. Stovnurin skal framføra bæði klassisk og nútímans altjóða verk.

Álagt er tjóðpallinum at røkka út til allar borgarar í landinum. Hann skal samstundis tryggja sjónleikarum, dansarum og øðrum leikhússtarvsfólki hóskandi arbeiðsmøguleikar til at menna yrkisførleika teirra og skipa fyri leiklistaligum útbúgvingum og eftirútbúgvingum.

Hóast Tjóðpallur Føroya helst fær politiska góðkenning í dag, so fylgir ongin játtan við. Sostatt verður bardagin næstu árini at snúgva seg um at geva karmunum innihald.

Mett verður ikki, at stovnsetingin av Tjóðpalli Føroya krevur, at nýtt tjóðleikhús verður bygt í bræði, men arbeitt verður fram ímóti, at Tjóðpallur Føroya eisini fær egið tjóðleikhús. Fyribils verður leitað eftir hóskandi høli í høvuðsstaðnum.

# Sjáldsom trø máttu lúta fyri bilrúsi

**Tvey trø úr Eldlandinum komu til Føroya í 1979. Undan hesum vikuskiftinum kundu tey erpa sær av, at tey vóru mest sjáldsomu trøini í allari viðarlundini. Til ein bilførari í sínum morgunrúsi fleyg inn í Plantasjuna og knústi tey sundur. Skógarfútin er ógvuliga keddur um hendingina, tí nú ganga minst 20 ár, áðrenn líknandi trø síggjast aftur**


*Tað vildi so illa til, at ávirkaði bilførarin rakti tey bæði mest sjáldsomu trøini í viðarlundini.*
*Mynd: Agneszka Johannesen*

VETRARBØRKUR
*Ingi Rasmussen*

Tey bæði mest sjáldsomu trøini í Plantasjuni máttu um vikuskiftið lúta fyri einum ørvitisknokki í bili.

Bilførarin, sum kom koyrandi við nógvari ferð eftir Hoydalsvegnum, misti tamarhaldið á sínum Toyota Corolla og fleyg inn í Plantasjuna. Ólukkutíð rendi hann beint á tvey sjáldsom trø úr Suðuramerika. Tey mest forkunnugu í allari viðarlundini.

– Hetta er harmiligt. Trøini hava vit fingið úr Eldlandinum í 1979, og tey hava staðið har síðan fyrst í 1980-árunum. Annað er fullkomiliga í knúsi, og hitt er illa skatt. Kanska yvirlivir tað, men tað verður ongantíð tað sama aftur, sigur Tróndur Leivsson, leiðari á Skógrøkt Landsins.

Óhappið hendi leygarmorgunin. Av politistøðini siga tey, at bilførarin rýmdi av staðnum, men tey fingu fatur á honum seinni. Hann verður nú ákærdur fyri rúsdrekkakoyring og missir helst koyrikortið.

Trøini høvdu annars yvirlivað bæði jólaódnina í 1988 og veður og vind í 20 ár. Nú tey fóru í fillur, høvdu tey vaksið seg til hálvan fjórða metur.

### Winther's Bark

Trøini hava onki navn á føroyskum, men á enskum verða tey nevnd »Winther's bark«, ella vetrarbørkur. Talan er um eitt lítið træ, ella ein stóran runn, úr Suðuramerika, sum er grønt alt árið og er sera sjáldsamt um okkara leiðir. Skal tað vaksa, má tað standa í lívd og vaksa í góðari mold. Bløðini hava ein serliga flottan grønan lit, sum minnir um Rodumdendrum. Blomstrini eru hvít og fruktir vaksa eisini á trænum, greiðir skógarfútin frá.

– Vit eru sjálvandi ógvuliga kedd um hetta. Vit hava spakuliga fingið trøini í framleiðslu á Gróðurstøðini, men hesi bæði høvdu fingið eina góða hædd, og nú ganga 20 ár, áðrenn tað kemur aftur í hesa støddina. Tað stóra spellið í hesum er, at vit ikki fáa kjansin at síggja, hvussu tey nú høvdu ment seg. Sum við so nógvum øðrum vøkstri, so vaksa tey betur og betur eftir at hava staðið í nógv ár, og tey vóru komin í ta fasuna, at tað sást sjónligur munur hvørt ár, sigur Tróndur Leivsson.

### Vón og vandalisma

Skógarfútin letur annars væl at viðarlundini – ella Plantasjuni, sum havnarfólk helst vilja kalla sín stoltleika. Veturin hevur verið blíður, og tað veksur og grør í hesum døgum, tá dunnurnar parast.

Í dag eru nógv fleiri sløg av vøkstri í Plantasjuni, enn tað vóru fyrr. Men størsti trupulleikin er vorðin, at tað fær ikki frið.

– Til dømis vóru tvey trø sett niður, tá Listasavn Føroya varð vígt. Annað setti løgmaður niður, og hitt setti borgarstjórin niður. Nú tey høvdu fingið eina hampiliga hædd, settu vit tey fram, men vikuskiftið aftaná, varð annað skrikt upp, og hitt illa brotið, sigur Tróndur Leivsson harmur.

Tað er serliga ringt, tá dansitiltøk hava verið í Badmintonhøllini. Skógarfútin vil ikki bara geva rúsdrekka skyldina, tí tað eru fólk, ið nýta Plantasjuna sum friðstað at drekka sær eina kenning, og tey gera ikki ónáðir.

– Tað er hendan vandalisman frá ungdómum, sum tey eisini kæra seg um aðrastaðni, ið ger um seg. Tað er rætt og slætt ein spurningur um hugburð. Vónandi broytist hann við tíðini. Vit síggja, at dagstovnar og skúlaklassar eru nógv herinnni, og tey børnini fáa kanska gott í beinini og læra at vera góð við okkara vøkstur, sigur Tróndur Leivsson.

### Einki eftirlit

Um sæð verður burtur frá tiltøkunum í Badmintonhøllini, so er tað hóast alt vorðið frægari síðstu 10 árini. Spurdur, um tað hevði verið eitt hugskot, at havt videoeftirlit í viðarlundini er hann skjótur at svara:

– Nei, nei, nei. Tað skal bera til at ganga ein túr í viðarlundini við síni hjartans kjeru uttan at vera eygleiddur av Big Brother, sigur Tróndur Leivsson, sum hóast alt kann gleðast um at síggja, at arbeiðið hjá Skógrøkt landsins ber frukt.

Tað eiga vit onnur eisini at gera.



# At vera menniskja og hava møguleikar

**Leygardagin og sunnudagin skipaði Tórshavnar Kvøld-og Ungdómsskúli og Tórshavnar Listaskúli fyri stórari og áhugaverdari framsýning í Eysturskúlanum í Havn**

FRAMSÝNING
*Vilmund Jacobsen*


*Hjá teimum, ið hava áhuga fyri málningalist og myndlist, var nógv at hyggja at.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Virksemið hjá Tórshavnar Kvøld-og Ungdómsskúla og Tórshavnar Listaskúla er nógv størri og fjølbroyttari enn fólk, sum ikki hava innlit í hetta arbeiði, duga at ímynda sær. Á velduga stóru og fjølbroyttu framsýningini, sum var í Eysturskúlanum í Havn leygardagin og sunnudagin, fekst tú eina ábending um, hvat hesin parturin av skúlaskipanini í Havn er mentur at skapa.

Í faldaranum hjá skúlanum fyri farna ár stendur niðast á fremstu síðu:
*FRAMTÍÐIN*
*- at vera menniskja*
*- at hava møguleikar*
*- at taka av avbjóðingum og mennast*
…

Millum tey mongu, sum vildu síggja, hvat hendur og hugflog kunnu skapa, var Sosialurin eisini framvið í Eysturskúlanum seinnapartin sunnudagin.

Nógv fólk var inni á gólvinum hesa løtu, og nógv streymaðu til, tá ið vit vóru á veg útaftur.

Á framsýningini, sum fevndi um ein stóran part av skúlanum, sást tú vovin, bundin og seymaði klædnapløgg, teppir og dúkar, hondgjørdar prýðislutir úr steini, postalínmáling, málningalist og aðra myndlist, lutir úr træi og medelskip og bátar - bert fyri at nevna nøkur ting úr hesi stóru framsýning.

Bæði leygardagin og sunnudagin var eisini undirhald á skránni.

Leygardagin setti Havnar Hornorkestur sín dám á byrjanina av framsýningini. Seinni sang barnakórið, Ung Stjørnuskot, og seinast á skránni leygardagin framførdi unglingaorkestrið tónleik á messingljóðførum.

Sunnudagin spældi harminorkestrið, GHM, musikkspælistovan undirhelt við sangi og dansi, og at enda var sangur við Eyð og Barbaru.

### Napoleon gevst

Napoleon Nólsoy, sum hevur verið skúlastjóri á Tórshavnar Kvøld-og Ungdómsskúla og Tórshavnar Listaskúla í meira enn 30 ár, hevur nú sagt seg úr hesum starvi vegna aldur.

Tá ið Napoleon segði upp til 1. februar í ár, varð heitt á hann um at halda fram í starvinum eina tíð aftrat.

Napoleon ætlar sær at gevast sum skúlastjóri, nú summarfrítíðin byrjar, men einki bendir á, at hann verður arbeiðsleysur - ella nýtist at keða seg.

Hesin fryntligi maðurin, sum flestu havnafólk og onnur við kenna, er ættaður frá Gjógv.

Konan, Gnippa Nólsoy, sum er ættað úr Dali, eisini er eitt kent andlit. Hon hevur í mong ár starvast sum sjúkrasystir, men hevur nú eisini lagt frá sær vegna aldur.

Napoleon hevur yvirtikið barnaheimið við Gjógv, og eini onnur hús eiga tey bæði í Dali, umframt húsini í Havn.

Napoleon og Gnippa hava nakað av seyði, bæði norðanfyri og sunnanfyri, so hvørgin teirra stúrir fyri, at dagarnir fara at tykjast ov langir.

- Nei, vit fara helst at hava nóg mikið at tríva í, nú vit leggja frá okkum, søgdu Napoleon og Gnippa, tá ið Sosialurin hitti tey í Eysturskúlanum sunnudagin.


*Tvey fryntlig fólk, Napoleon og Gnippa Nólsoy. Bæði leggja nú frá sær vegna aldur. Kortini sæst aldur ikki á teimum…*
*- Vit hava nógv at takast við, so vit fara ikki at keða okkum.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*


*Veðrurin, sum Rógvi Hansen hevur gjørt. Abbasonurin við sama navn, Rógvi Hansen, er errin av abbaum.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*


*Páskirnar vóru ikki gloymdar á framsýningini í Eysturskúlanum.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*